# Fjarðafestivalurin

**Í 2006 varð Fjarðafestivalurin ikki vælsignaður við góðveðri, men fyri tey 2500 fólkini, ið vóru komin saman á økinum kring Kelduna í Skálafirði, var vikuskiftið bæði væleydnað og hugnaligt**



Í fjør prógvaðu áhoyrararnir, at tað ber til at flippa út – edrúur

ÁHOYRARAR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eini 2500 fólk vóru seinasta vikuskiftið í august 2006 vitni til tann allar fyrsta Fjarðafestivalin. Hetta gjørdist ein sera jalig uppliving, har góður tónleikur varð framførdur í góðum karmum. Tónlistarliga hæddarpunktið var fyri flest øll, tá høvuðsnavnið Tait fór á pall uttan fyri Kelduna. Tá bólkurin hjá fyrrverandi DC Talk oddamanninum, Michael Tait, spældi DC klassikaran Jesus Freak, var alt á gosið. Hetta var júst lagið, sum fólk høvdu bíða eftir, og tóktist tyngdarlógin fullkomiliga at missa tamarhaldið á teimum hoppandi áhoyrarunum.

## Minniligar løtur

Men eisini fleiri av hinum 21 nøvnunum, ið fóru á pall á fyrsta Fjarðafestivalinum sannførdu. Fleiri løtur brendu seg fastar í minnið hjá áhoyrarunum. Ummælarin hjá Sosialinum skrivaði t.d. um framførsluna hjá Heina Lützen: "tað sum hugtók meg allarmest, var ein tung útseting av einum Kingosálmi. Sálmurin var gjøgnumsúrgaður av pínu, og var hetta ein so sterk løta, at eg næstan gloymdi at anda. Serliga gjørdist lagið stórt ímóti endanum, tá ið allir tónleikararnir spældu meiri frítt."

Um Sigrid Rasmussen skrivaði ummælarin: "Sigrid er ein verulig diva á pallinum. Hon sær gott út, hon hevur tí røttu útstrálingina og hennara sanghátttur hevur ein rættan altjóða dám"

Um Petur Háberg skrivaði hann: "Eyðkent fyri Petur er hansara sera vakra rødd. Tað er bergtakandi at hoyra, hvussu gott tamarhald hann hevur á røddini. Hann syngur púra reint, sjálvt tá ið hann fer yvir í falset."

## Karmarnir riggaðu væl

Karmurin um Fjarðafestivalin var, sum í ár, økið rundan um Kelduna í Skálafirði. Økið riggaði væl, tað er avmarkað og tóktist lætt at halda skil á.

Parkeringsøkið uttanfyri Kelduna gjørdi eisini sítt til, at festivalurin var so atkomuligur. Parkeringsøkið er stórt, og har vóru alla tíð vaktir, sum beindi teg til ein bás. Hetta var eitt stórt pluss fyri heildarupplivingina.

## Gott ljóð

Serliga vóru ljóðviðurskiftini inni í Kelduni heilt góð. Salurin er bygdur soleiðis, at sum mest fæst burturúr ljóðinum, og saman við einum frálíkum anleggi, fingu tey, sum lýddu á, eina framúrskarandi ljóðmynd inni í salinum. Sostatt vóru karmarnir inni í Kelduni heilt góðir. Stóri pallurin á graslíkisvøllinum aftanfyri kelduna hýsti teimum størru bólkunum, og eisini hetta riggaði væl. Tað var serliga heppið, at talan var um graslíki, tí at vikuskiftið var eitt sindur vátt, og tú kanst ímynda tær, at undirlagið hevði verið nakað ótespiligt, um fólk stóðu á bøi. Ljóðviðurskiftini vóru til tíðir heilt góð úti á vøllinum. Serliga tá ið teir betru bólkarnir spældu.

## Seinkingar darvaðu

Men Fjarðafestivalurin hevur eisini okkurt at læra. Skráin fríggjakvøldið varð illa darvað av seinkingum. Fleiri bólkar máttu skera nøkur løg av síni skrá fyri at loyva øðrum framat. Hetta er tó ein rættiliga vanlig barnasjúka, og átti at verið grødd í ár. Longu leygarkvøldið í fjør var skráin nógv betur hildin. Næstan allar framførslurnar byrjaðu uppá minuttin, men seint út á kvøldið vóru tær eitt sindur seinkaðar.

Samanumtikið var Fjarðafestivalurin 2006 tó ein góð uppliving.


Høvuðsnavnið í fjør, Michael Tait, hevði eina brakandi góða konsert, sum uttan iva telist millum bestu, kristnu framførslurnar á oyggjunum nakrantíð